# Jákup Zahle



Tú fylgdi mær væl mína reystastu tíð,
um lagnan var hørð, ella leiðin var blíð,
um neyð ella sorg inn at hjarta mær gekk,
tá linna og troyst altíð frá tær eg fekk.

Sjálvur valdi tú sálmarnar, vit skuldu syngja henda tunga dagin, fríggjadagin 8. februar í 2002, tá ið tann syrgjandi mannfjøldin og tín stóri vinaskari fylgdi tær til tína dýggjvátu grøv.

Svárt var at fylgja tær ta seinastu tíðina og vita, hvussu tú viknaði dag frá degi. At vita frá tínum næstu, at dagamunur sást á tær. Svárt var at vitja teg jóladag og hoyra tína áður so djúpu, sterku, nú deyðamerktu rødd græla við ynskinum um eini gleðilig jól. Svárt var saman við tær at staðfesta okkara ómegd, tá ið boðini eru eftir okkum. Tyngst var at hoyra teg biðja farvæl við ynskinum um, at vit sóust aftur, áðrenn tú fórt hiðan.

Fjálgt er at minnast tann dagin fyri meira enn tríati árum síðan, tá ið vit báðir hittust fyrstu ferð. Hvussu tú alt fyri eitt geislaði tína íbornu mensku frá tær við tíni so sera dámligu medferð. Hesin dagur var hornasteinurin, tá ið vit báðir gjørdust vinmenn. Nakað seinni ringdi Jens Pauli Heinesen til mín og spurdi, um eg dugdi at spæla sjónleik. Tað var ikki gott at vita, tí eg hevði ongantíð roynt tað fyrr, men tað hevði tú. Og tú lærdi meg, hvussu eg skuldi bera meg at við mínum leikluti í sjónleikinum hjá Jens Paula, »Uppi í eini eikilund«.

Eg var hugtikin, Jákup. Hugtikin av tínum ríku gávum og sjáldsama gamanslyndi. Vit ferðaðust saman her á landi við leikinum. Vit fóru heilt til Reykjavíkar við hesum fyrsta føroyska leiki, ið varð spældur uttanlands.

Eg var hugtikin, Jákup. Hugtikin av at sanna ferð eftir ferð, at tú altíð vart so reiðiligur. At tað altíð bar til at kenna tín vinskap í gaman og álvara.

Vit hava mist teg Jákup, men títt lyndi liggur eftir hjá okkum øllum, ið kendu teg og vóru góð við teg, soleiðis sum tú eisini vart góður við okkum.

Blóman er yndislig at sjá,
virkar sær tó ongan klædnatráð;
og móti klæðum, sum hon ber,
drotningabúni følin er.
Guð havi lov.

Ærað veri minnið um teg, Jákup Sáli.

**Sonne Smith**

# Norðurmót

**Tíðindaskriv:**

Beint áðrenn jól góðkendi ES endaliga Norðurmót ætlanina (Northern Periphery Programme), og skipanin er nú til reiðar at taka ímóti umsóknum um stuðul til verkætlanir.

Norðurmót er økismenningarætlan hjá ES, sum Føroyar hava fingið innbjóðing at luttaka í. Føroya landsstýri gjørdi tíðliga av at luttaka og hava Føroyar tí verið við í fyrireikingunum av ætlanini. Norðurmót fer at brúka umleið 27 mió. kr. um árið fram til 2006 til stuðul til verkætlanir. Av hesum kostnaðinum bera Føroyar sín part.

Samstarvið fevnir um norðastu partarnar av Finnlandi, Svøríki, Noreg og Skotlandi umframt Grønland og Føroyar. Ísland kemur væntandi við í næstum. Av felags áhuga fyri hesi londini er:

– tørvurin á at betra um kappingarførið fyri at viga upp ímóti frástøðu og spjaddari búseting

– at viðurkenna og fult út nýta náttúrutilfeingi og menniskjaligt tilfeingi, sum eru serlig fyri økini

– at stuðla og menna samfeløg sum hava trupulleikar av minkandi fólkatali og tænastum

Norðurmót hevur út frá hesum raðfest trý høvuðsøki – samskifti, burðardygg búskaparlig menning og samfelagsmenning, og fer at veita stuðul til verkætlanir innan hesi. Í talvuni sæst nágreiniligari hvørji sløg av verkætlanum verða stuðlað.

Føroyskar fyritøkur, stovnar, undirvísingar- og granskingarstovnar, kommunur o.fl. fáa við hesum betri møguleika at taka upp mennandi samstarv við samstarvspartar í grannalondunum. Til dømis kunnu virkir fara saman við almennum stovni ella ráðgevingarfyritøku í samstarv við útlendingar um verkætlan.

Møguleiki kann í ávísum førum eisini vera fyri at fáa partvísan stuðul frá NORA til Norðurmót verkætlanir, ella at menna eina verkætlan ávegis við stuðli frá NORA og at søkja Norðurmót um stuðul til framhald saman við samstarvspørtum úr ES.

Tey, sum hava áhuga í stuðli frá Norðurmóti mugu sum tað fyrsta finna sær samstarvspartar. Norðurmót skipar í hesum sambandi fyri tveimum ráðstevnum um árið, har verkætlanir verða lagdar fram og møguligir umsøkjarar kunnu hittast. Herumframt hjálpir Norðurmót við at miðla uppskot um verkætlanir til møgulig áhugað. M.a verður ein skrá yvir verkætlanir gjørd í sambandi við ráðstevnurnar.

Tann fyrra av ráðstevnunum í ár verður í Finnlandi 28. februar - 1. mars og tann seinna verður í Íslandi í heyst.

Tað er ein treyt, at verkætlanir skulu hava luttøku úr minst trimum londum, og at minst eitt av hesum er ES-land. Tann samstarvsparturin, sum hevur leiðsluna av verkætlanini, skal vera úr ES-landi ella Noregi.

Norrøna Atlantssamstarvið (NORA) virkar sum samskiftisskrivstova hjá Norðurmóti í Føroyum. Tey, sum vilja hava fleiri upplýsingar, og tey, sum á einhvønn hátt hava brúk fyri hjálp til at fremja verkætlanir innan Norðurmót, eru vælkomin at venda sær til NORA (www.nora.fo). Til ber eisini at venda sær beinleiðis til høvuðsskrivstovuna hjá Norðurmóti www.northernperiphery.net

Norrønt Atlantssamstarv
Kaspar Lytthans / Lis Hammer

# MFS og Altjóða Skrivstovan á lestrarferð

ÚTBÚGVING
*Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) og Altjóða Skrivstovan (ASK)*

Í viku 5 vóru umboð frá MFS á vitjan á øllum miðnámsskúlum í Føroyum.

Endamálið var at kunna um ymisk viðurskifti, sum eru týðandi fyri næmingar, ið ætla sær at fara í holt við víðari lesnað.

MFS-umboðini viðgjørdu serliga viðurskiftini í Danmark, meðan Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni (ASK) greiddi frá um lestrarviðurskifti í øðrum londum.

Í hesum døgum nærkast freistin at søkja um útbúgvingarpláss gjøgnum kvotu 2 í Danmark. Í Danmark er tað nevniliga soleiðis, at hevur ein ikki tað kravda miðaltalið (sum gevur atgongd gjøgnum kvotu 1), er møguligt at savna sær stig, og á tann hátt fáa atgongd til tað ynskta lestrarplássið. Ymiskt er hvat tey ymisku útbúgvingarstøðini leggja dent á, so tað loysir seg at lesa væl uppá og/ella seta seg í samband við útbúgvingarstaðið. Tá ið søkt verður gjøgnum kvotu 2, skal ein »levnedsbeskrivelse« ofta skrivast. Her verður greitt frá, hví tú velur júst hesa útbúgvingina, hvør tín serligi førleiki er, og hvat tú hevur hugsað tær at nýta útbúgvingina til. Freistin at søkja gjøgnum kvotu 2 er 15. mars. Umsóknarblaðið, KOT, fæst á LFÚ-ráðgevingini og í miðnámsskúlunum frá miðjan februar; tað er seinkað í ár vegna stjórnarskiftið í Danmark. Tað liggur eisini á heimasíðuni www.ivuc.dk

Fyri tey, ið hava tað miðaltalið, ið krevst, er freistin 1. juli sama árið, sum byrjað verður 1. september. Teimum nýtist bert at útfylla umsóknarblaðið og viðleggja prógv frá miðnámsskúlanum. Svarið kemur við postinum umleið 29. juli.

Týdningarmikið er, at ikki verður bíðað við at søkja bústað, til svarið er komið. Tað er ov seint, tí bíðitíðin – serliga í størru býunum í Danmark – kann vera sera long, heilt upp í 9-12 mánaðir. Dømi eru tó eisini um at lesandi fáa bústað innan 2-3 mánaðir.

Tey, ið ætla sær at byrja komandi heyst (september 2002), kunnu vanliga søkja um at sleppa at flyta inn 3 mánaðir fyri lestrarbyrjan, men ymiskt er, nær ein kann søkja av fyrstan tíð.

Summi kollegii loyva umsøkjarum at søkja 6 mánaðir frammanundan, meðan tey aðra staðni siga 3 mánaðir. MFS vil við hesum gera vart við, at vit á lestrarkunningini – og seinni í Útvarpi Føroya – av misgáum søgdu, at teir 6 mánaðirnir vóru galdandi fyri bústaðarsøking sum heild.

Rátt verður til, at lestrarsøkjandi altíð seta seg í samband við tey kollegii, søkt verður til. Um søkt verður úr Føroyum, økir tað um møguleikarnar at fáa bústað, tí tey, ið hava langan tein í skúla, sleppa longur upp á bíðilistan.

Mong onnur viðurskifti eru umráðandi at seta seg inn í, tá ið farið verður í holt við víðari lesnað. Hetta kann m.a. gerast við at luttaka í Pisudegnum, sum MFS skipar fyri, og sum verður hildin á hvørjum ári um ólavsøkutíð. Ein annar máti er at seta seg í samband við MFS á mfs@mfs.fo.

Í útlandinum eru umsóknarfreistirnar ymiskar í teimum ymisku londunum. Tað eigur tú at kanna í góðari tíð, kanska upp til eitt heilt ár frammanundan, greiddi Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni, ask@ask.fo, frá. Á ASK fært tú eisini meira at vita um útbúgvingar í útlandinum.

Samanumtikið eydnaðist lestrarkunningin sera væl, men vegna veður var kunningin tíverri avlýst á miðnámsskúlanum í Vági. Arbeitt verður við at finna tíð til eina nýggja vitjan seinni í vár.

Næmingarnir á ymsu skúlunum vóru sum heild heilt væl nøgdir við kunningina hjá MFS. Hetta kann m.a. lesast í teimum spurnarbløðum, sum næmingarnir fyltu út aftaná at lestrarkunningin var lokin. Ein samandráttur av svarunum hjá næmingunum – og annars lestrarkunningini sum heild – verður prentað í limablaðnum hjá MFS seinni í ár.



# Deyvafelag Føroya 30 ár

**Ikki kann sigast, at umstøðurnar eru góðar fyri deyv í Føroyum, men Tulkatænastan er eitt stórt framstig, sum hevur gjørt tað møguligt, at nema sær útbúgving í her heima**

DEYVAFELAGIÐ
*Marjun Dalsgaard*

Umstøðurnar í Føroyum fyri deyv eru ikki góðar, men eitt sera stórt framstig er Tulkatænastan. Tulkatænastan hevur, millum annað, gjørt tað møguligt fyri deyv at taka eina útbúgving her heima. Síðan Tulkatænastan kom, hava fleiri deyv eisini gjørt brúk av hesum møguleika og víst, at tað er møguligt, at taka eina útbúgving her heima í Føroyum. Tulkatænastan hevur somuleiðis gjørt tað møguligt at fara til sjónleik og t.d at hoyra ólavsøkurøðuna og flaggdagsrøðuna. Hetta er sera gott, sigur Maria Ellefsen. Tað er sovorði, sum tey flestu hoyrandi taka fyri givið til dagliga.




*Í juli 1982 var farið undir at byggja eini deyvahús, sum vórðu tikin í nýtslu í dec. 1983. Í dag búgva trý deyv og ein hoyrandi í húsunum, har skrivstova felagsins eisini heldur til*

**Ov vánalig sjónvarpstænasta**

Maria Ellefsen, formaður í Deyvafelag Føroya sigur, at nógv mál tó enn eru eftir at loysa. Hon hugsar serliga um, hvat tey deyvu fáa fyri peningin tey lata í sjónvarpsgjaldi. Deyv hava í fleiri ár goldið sjónvarpsgjald og kundu hugsa sær eina betri tænastu her frá.

At vera ein partur av einum samfelagi, sum er innrættað soleiðis, at tú ikki hevur somu møguleikar, sum meirilutin, at fylgja við í tí, sum gongur fyri seg, er ikki lætt. Flest øll taka fyri givið, at tey kunnu hoyra tíðindini í Útvarpi Føroya og at fylgja við í Degi og Viku. Samfelagið hevur kanska lyndi til at gloyma, at ein minniluti í samfelagnum, sum skal virka í hesum ikki hoyrir, hvat verður sagt í miðlunum. Deyvafelagið hevur tí leingi arbeitt við, at fáa fleiri sendingar tekstaðar, ella at fáa Dag og Viku senda á teknmáli. Hetta gongur tó sera strilti. Trupulleikin er, sum við øllum øðrum, at ikki nokk pengar eru til hetta. Deyvafelagið hevur tó havt ein fund við Sjónvarp Føroya, har tosað var um, at teksta fleiri sendingar. Tað verður nokk ikki møguligt at fáa Dag og Viku á teknmáli, tí hetta rakar ein ov lítlan bólk.



*Tað er ikke lætt at vera deyvur í Føroyum, men eitt vit eru sera glað fyri, er tulkatænastan, sigur Maria Ellefsen, formaður í Deyvafelag Føroya*

**Mangla ein deyvaráðgeva**

Ein annar stórur trupuleiki er, at eingin deyvaráðgevi er. Hetta er eitt mál, sum Deyvafelagið hevur arbeitt við í fleiri ár, men kortini bíða tey enn. Ein deyvaráðgevi er ein sosialráðgevi, sum kennir serliga væl teir trupuleikar, sum deyv hava, og sum kann ráðgeva teimum í ymiskum løgfrøðiligum málum. Men tað er trupult at koma ígjøgnum við nøkrum, sigur Maria Ellefsen, formaður í Deyvafelagnum.

Deyvafelag Føroya varð stovnað 12. feb. 1972 í Gøtu. Felagið var stovnað fyri at varveita mentanina og teknmálið hjá teimum deyvu, sum er ein málsligur minniluti í samfelagnum. Útyvir at hittast fyri fremja áhugamál teirra deyvu, hittast limirnir eisini til ymisk tiltøk. Til dømis hittast tey hvørt mánakvøld til biograftúrar, bowling, sjónleik og tílíkt.

– Tað er av stórum týdningi, at fólk, ið eru deyv, hava eitt stað, sum tey kunnu venda sær til, um tey hava trupuleikar av onkrum slag, sigur Maria Ellefsen. Tað er eisini bert, um vit arbeiða saman, at vit kunnu røkka tey mál, vit seta okkum.

Fólk, sum hava hava børn, sum eru deyv, hava eisini ofta brúk fyri ráðgeving. Tey kunnu eisini venda sær til Deyvafelagið. Deyvafelag Føroya hevur 30 aktivar limir og 990 stuðlandi limir. Stuðlandi limir eru limir, sum ikki sjálvi eru deyv, men ynskja at stuðla felagnum á ymiskan hátt. Tað hevur allan týdning at eitt tílíkt felag hevur stuðlar, men skipað verður eisini fyri jólakalendarum og øðrum, fyri at savna pening inn, sum tey kunnu arbeiða við. Í samabandi við føðingardagin, hevur Deyvafelagið gjørt eina plakat. Hon kostar 150,- kr og er at fáa á skrivstovu teirra.

Sosialurin ynskir Deyvafelag Føroya tillukku við 30-ára føðingardegnum!




*Í sambandið við dagin hevur íslendarin Villhjálmur G. Villhjálmsson, sum sjálvur er deyvur, gjørt eina plakat. Plakatin kostar 150,- og kann fást í Deyvahúsinum*